Vikuskiftis Sosialurin



## Obama rættir Iran hondina

Amerikanski forsetin, Barack Obama, ger nú eina roynd at bøta um viðurskiftini við Iran. Í einari rættiliga óvanligari sjónbandsrøðu tosar forsetin um eina nýggja byrjan og sigur, at hann vil hava enda á teimum figgindaligu viðurskiftunum millum USA og Iran. Politiskir eygleiðarar siga, at tað er neyvan av tilvild, at røðan bleiv almannakunngjørd sama dag, sum tann iranska Nowruz-hátíðin byrjar. Í røðuni gloppar Obama dyrnar fyri, at USA og Iran kunnu taka tað diplomatiska sambandið uppaftur, og hann sigur seg vera til reiðar til at fáa Iran inn í altjóða samfelagið. Hetta er beint tað øvugta av politikkinum hjá undanmanni hansara, George wW. Bush.



## Flogvanlukka í Ekvador

Sjey fólk doyðu, tá eitt hernaðarflogfar datt niður í Ekvador í gjárkvøldið. Fimm fólk vóru í flogfarinum, og øll doyðu. Flogfarið datt niður í høvuðsstaðin Quito og rakti eini hús, har tvey fólk doyðu, og tvey onnur fingu skaða. Húsini, sum flogfarið rakti, eru í fimm hæddum. Eldur kom í tey, men tað eydnaðist sløkkiliðnum at hjálpa teimum flestu út og at basa eldinum. Tað er ikki greitt, hví flogfarið datt niður, men veðrið var vánaligt í Quito í gjárkvøldið. Nógv fjøll eru rundan um býin, og tey hava ofta givið flogskiparum trupulleikar, skrivar AP.

# Umvælingar á Skálatrøð neyðugar

**Bátabummarnir við flótibrýdnar á Skálatrøð eru nú so illa farnir, at neyðugt verður at skifta teir út. Samstundis skal elveitingin, sum somuleiðis er vorðin vánalig, gerast av nýggjum**

BÁTAPLÁSS
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í nógvum førum er útbúnaðurin á bátaøkinum við Skálatrøð í góðum standi. Teymar, grundketur og annað verður kannað árliga, og somuleiðis verður alt skrásett soleiðis, at fylgjast kann við, nær neyðugt er at skifta ketur og teymar út.

Men bátabummarnir eru í vánaligum standi. Teir eru nú eisini farnir út yvir áramálið fyri teirri livitíð, sum framleiðararnir høvdu sagt gott fyri. Tað hendir nú javnan, at bátabummar fara, tá illveður er, og tí hevur býráðið í Havn tikið støðu til, at allir bátabummarnir skulu skiftast út.

Tilboð eru fingin til vega frá fýra veitarum úr Danmark, Noregi og Svøríki, og tá prísur og dygt er tikið við í metingarnar hevur býráðið gjørt av at taka við tilboði frá svenskum framleiðara, Nordiska Flytbryggor Ab, sum Tórshavnar Maskinverkstaður umboðar. Hetta eisini út frá teirr sannroynd, at svenska krónan er serliga lág í løtuni, og tí er svenska tilboðið serliga bíligt.

Av tí sama er avgjørt at keypa bátabummar til alla bátahavnina á Skálatrøð, tilsamans 179 bummar. Hesir fáast fyri 2,3 milliónir, og við ymiskum øðrum tilfari verður samlaði kostnaðurin 2,85 milliónir krónur.

Eisini elveiting

Samstundis er gjørt av, at elveitingin skal skiftast út, og hetta arbeiðið varð bjóðað út millum innbodnar fyritøkur. Mett eftir prísi og dygd varð tikið av tilboði frá LM-Electric, og samlaði prísurin er 1,6 milliónir krónur.

Hetta arbeiðið umfatar nýggja høvuðsveiting til Skálatrøð, legging av nýggjum kaðalum og uppseting av 49 standarum við íalt 168 elstykkjum, sum kunnu víðkast við 24 stykkjum, partvís nýggj ljós á bátabrúgvunum umframt eina nýggja gjaldsskipan soleiðis, at báteigararnir sjálvir avgreiða nýtslu um eina automat, sum verður sett upp í Vágsbotni.

Farið verður undir arbeiðið beinanvegin, og eftir ætlan skal arbeiðið at skifta bátabummarnar út við teirri manning, sum Tórshavnar Havn hevur, taka trý summar. Arbeiðið at skifta elveitingina verður gjørt nú í summar.



*Jákup Símun Simonsen, formaður í havnanevndini, sigur, at neyðugt er at gera ábøturnar á bátabrúgvarnar, bæði fyri trygdina og fyri tænastustøðið*
Mynd: Jens Kristian Vang

# Bátapláss gerast á Gomlurætt

**Tórshavnar býráð samtykti í gjárkvøldið, at leiga øki á Gomlurætt frá Landsverk og leggja út bátabrúgvar til 16 smábátar**

BÁTAPLÁSS
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Nú skal bátapláss gerast á Gomlurætt*

Smábátar hava í longri tíð ligið við teym á Gomlurætt og aðrir hava staðið á havnarøkinum. Nakrir av hesum bátum hava søkt um bátapláss á Gomlurætt, men av tí at tað er Landsverk, sum umsitur hesa havnina sum landshavn, hevur eingin av hesum bátunum fingið nakað leguppláss frá Tórshavnar Havn.

Landsverk vísti fyri tíð síðani á, at allir bátarnir, bæði teir, ið liggja fyri teym, og teir, ið standa á landi, vóru har uttan loyvi og kravt var, at allir bátarnir vóru beindir burtur av økinum.

Tórshavnar kommuna hevur tó síðani verið í samband við Landsverk fyri at finna eina loysn á málinum, og partarnir eru nú samdir um, at Tórshavnar Havn skal leiga økið á Gomlurætt, so bátar við loyvi frá myndugleikunum kunnu standa har, eins og Tórshavnar kommuna skal leggja flótibrúgvar út, so pláss verður fyri 16 bátum.

Smábátarnir, sum í dag liggja við teym á Gomlurætt, eru fyri tað mesta frá Kirkjubø, Velbastað og Norðradali, og eigararnir hava sjálvir – og uttan loyvi – lagt teymarnar út. Sama er galdandi fyri teir bátar, sum standa á økinum, teir standa eisini har uttan loyvi.

Byrja beinanvegin

Tað standa í løtni 20 bátar úr teimum fýra bygdunum í Tórsharvar kommunu á vestursíðuni av Streymoynni á bíðilista. Nú er so samtykt at gera løgupláss til 16 bátar í fyrstu syftu, umframt at leiga eitt 3.000 fermetrar stórt keiøki á Gomlurætt, har bátar so eisini kunnu standa.

Tórshavnar kommuna hevur gjørt ein leigusáttmála við Landsverk um økið fyri 60.000 krónur um árið, ið umfatar tað nevnda umframt bátabrúnna til ferðafólk.

Tað er Tórshavnar kommuna, sum rindar fyri íløgurnar í havnunum hjá kommununi, meðan tað er Tórshavnar Havn, ið stendur fyri rakstrinum.

Samlaði kostnaðurin fyri flótibrúgv við tilhoyri, útlegging, festum bátabummum, ljós, vatn og annað verður mett til 660.000 krónur, sum samtykt er at seta av til hetta endamálið.

Jákup Símun Simonsen, formaður í havnanevndini, sigur, at teir ætla at fara undir arbeiðið skjótast tilber.